LM-128/2018

# Fiskimálaráðið

**Løgtingið**

Dagfesting: 4. mars 2019
Mál nr.: 18/00518-18
Málsviðgjørt: TVR-USW/KM
Eftirkannað: 20-02-2019

**Løgtingsmál nr. 128/2018: Uppskot til løgtingslóg um kóp (Kópalógin)**

**Uppskot til**

**Løgtingslóg
um
kóp
(Kópalógin)**

*Virkisøki og endamál lógarinnar*

**§ 1.** Henda løgtingslóg fevnir um øll sløg av kópi, Pinnipedia, og lógin er galdandi á landi og í føroyskum sjógvi.

**§ 2.** Løgtingslógin hevur til endamáls at tryggja røkt og lívfrøðiliga og búskaparliga burðardygga gagnnýtslu av øllum sløgum av kópi.
*Stk. 2.* Til tess at fanga, veiða ella drepa øll sløg av kópi, Pinnipedia, krevst loyvi frá landsstýrismanninum sambært §§ 3 og 4 í hesi løgtingslóg.

*Loyvi til burðardygga veiðu*

**§ 3.** Landsstýrismaðurin, ella tann, ið landsstýrismaðurin heimilar til tess, kann, eftir skrivligari umsókn og eftir ummæli frá Havstovuni, geva loyvi til burðardygga kópaveiðu. Loyvið skal vera treytað í mun til ávís øki, veiðinøgd, útgerð, neyðug vápnaloyvi o.a. Loyvið er persónligt og tíðaravmarkað í upp til tvey ár í senn.
*Stk. 2.* Uttan so, at loyvi er givið sambært § 6, stk. 4, kann kópaveiða sambært hesi lógargrein bert verða framd við skotvápni, sum skal lúka kravið í § 6, stk. 3 í hesi løgtingslóg, og viðkomandi skal í hvørjum einstøkum føri hava galdandi vápnaloyvi til endamálið, sambært løgtingslóg um vápn v.m., áðrenn endaligt loyvi kann verða givið.
*Stk. 3.* Loyvishavari, sambært stk. 1, skal beinanvegin skráseta og senda skrivliga fráboðan til Havstovuna og landsstýrismannin, ella tí, ið landsstýrismaðurin heimilar til tess, um veiðinøgdina av kópi.

*Loyvi innan alivirksemi*

**§ 4.** Landsstýrismaðurin, ella tann, ið landsstýrismaðurin heimilar til tess, kann, eftir skrivligari umsókn frá alifelag, sum hevur aliloyvi, geva loyvi til at drepa kóp, sum er til ampa fyri aliútbúnað ella útgerð o.a., sum verður brúkt innan aling. Loyvið skal vera treytað í mun til ávíst aliøki,

drápsnøgd, útgerð, neyðug vápnaloyvi o.a. Loyvi eru tíðaravmarkað í upp til fimm ár í senn.
*Stk. 2.* Kópadráp, sambært hesi lógargrein, kann bert verða framt við skotvápni, sum skal lúka kravið í § 6, stk. 3 í hesi løgtingslóg, og drápið skal vera framt av ávísum navngivnum ábyrgdarpersóni, og viðkomandi skal í hvørjum einstøkum føri hava galdandi vápnaloyvi til endamálið, sambært løgtingslóg um vápn v.m.
*Stk. 3.* Áðrenn kópur verður dripin, skulu onnur hóskandi og minni víðfevnd stig takast til tess at steðga skaða á aliútbúnað ella útgerð o.a.
*Stk. 4.* Alifeløg, sum hava aliloyvi, skulu beinanvegin, fyri hvørt aliøki sær, skráseta og senda skrivliga fráboðan til Havstovuna og landsstýrismannin, ella tí, ið landsstýrismaðurin heimilar til tess, um nøgdina av kópi, sum verður dripin í sambandi við alivirksemi, ella sum av øðrum orsøkum doyr í sambandi við alivirksemi.

*Afturtøka av loyvum*

**§ 5.** Landsstýrismaðurin, ella tann, ið landsstýrismaðurin heimilar til tess, kann taka aftur givin loyvi, um brot er framt á reglurnar í hesi løgtingslóg, ella reglur, ásettar við heimild í hesi løgtingslóg.

*Djóravælferð, bann og krøv til skotvápn*

**§ 6.** Tá ið veiða ella dráp av kópi, sambært §§ 3 og 4, fer fram, skal veiðan ella drápið fara fram við størsta varsemi og fremjast á djóravælferðarliga fullgóðan hátt.
*Stk. 2.* Hóast møgulig loyvi verða givin, sambært §§ 3 og 4, er bannað at fanga ella at skaða kóp við nýtslu av línu, gørnum, saksi, rúsum ella øðrum sløgum av fellum.
*Stk. 3.* Tað er bara loyvt at skjóta kóp við skotvápni við ríflutari pípu og lóðri við víðkandi kúlu og við einum virði á kúlustoytinum áljóðandi minst 2.700 joule, 275 kilogrammmetur, fyri 9,0 til og við 9,9 grams kúlur fyri eina fjarstøðu, áljóðandi 100 metrar ávikavist 2.200 joule, 225 kilogrammmetur, fyri 10,0-11,0 grams kúlur fyri eina fjarstøðu, áljóðandi 100 metrar.
*Stk. 4.* Landsstýrismaðurin kann, eftir skrivligari umsókn, loyva, at kópur verður veiddur á annan hátt enn við skotvápni.

*Fiskiveiðieftirlit*

**§ 7.** Fiskiveiðieftirlitið kann við samleikaváttan og uttan rættarúrskurð fara inn á aliøki og hartil krevja atgongd til høli at gera tænastukanningar.
*Stk. 2.* Verður felag ella persónur, dømdur fyri lógarbrot ella góðtekur eina uttanrættarliga avgerð í sambandi við lógarbrot, grundað á kanningar, gjørdar sambært hesi løgtingslóg, skal eigarin av alibrúkinum gjalda kostnaðin av kanningunum.
*Stk. 3.* Tey, sum hava ábyrgd av tí, ið kannað verður, hava skyldu til at hjálpa Fiskiveiðieftirlitinum í tænastuligu kanningum sínum, og hava rætt til at vera hjástødd undir slíkum kanningum. Er sannlíkt, at revsiákæra verður reist, skal Fiskiveiðieftirlitið upplýsa viðkomandi um, at hann ikki hevur skyldu til at úttala seg.

*Avgreiðslugjald*

**§ 8.** Landsstýrismaðurin, ella tann, ið landsstýrismaðurin heimildar til tess, kann taka gjald fyri avgreiðslu av loyvum sambært hesi løgtingslóg.

*Kunngerðarheimild*

**§ 9.** Landsstýrismaðurin kann í kunngerð áseta reglur um at skipa kópaveiðu og kópadráp, harímillum gera ásetingar um veiðinøgd, veiðiøki, veiðitíð, veiðihátt, útgerð, førleikakrøv, friðingartíðir, skráseting og innlating av sýnum og lívfrøðiligum tilfari til granskingarendamál.

*Revsing*

**§ 10.** Er ikki hægri revsing ásett í aðrari lóggávu, verður tann revsaður við sekt ella fongsli upp til 4 mánaðir, sum tilætlað, ella av grovum ósketni, fremur brot á § 2, stk. 2, § 3, stk. 2 og 3, § 4, stk. 2-4, § 6, stk. 1-3 og § 7, stk. 3, 1. pkt. í hesi løgtingslóg, og sum fremur brot á reglur, givnar við heimild í § 9 í hesi løgtingslóg.
*Stk. 2.* Revsingin, sambært stk. 1, kann herðast upp í 1 árs fongsul, um brotini sambært stk. 1 verða framd ferð eftir ferð.
*Stk. 3.* §§ 21 og 23 í revsilógini eru eisini galdandi fyri revsiábyrgd sambært stk. 1 og 2.
*Stk. 4.* Feløg og aðrir løgfrøðiligir persónar koma undir revsiábyrgd eftir reglunum í kapitli 5 í revsilógini.
*Stk. 5.* Mál, sum verða viðgjørd eftir reglum í hesi løgtingslóg, verða viðgjørd sum løgreglumál, samanber tó § 11.
*Stk. 6.* Rættartiltøkini í rættargangslógini í kapitli 72 um at leggja hald á og í kapitli 73 um rannsókn kunnu nýtast í sama mun sum í statsadvokatmálum.

*Uttanrættarlig sektaruppskot*

**§ 11.** Fiskiveiðieftirlitið hevur eftirlit við, at reglurnar í hesi løgtingslóg, og reglur, ásettar við heimild í hesi løgtingslóg, verða hildnar.
*Stk. 2.* Í málum um brot sambært § 2, stk. 2, § 3, stk. 2 og 3, § 4, stk. 2-4, § 6, stk. 1-3 og § 7, stk. 3, 1. pkt. í hesi løgtingslóg, og sum eru fevnd av reglum, givnar við heimild í § 9, har Fiskiveiðieftirlitið metir, at nøktandi greidleiki er á veruligu umstøðunum í málinum, at brotið ikki kemur undir strangari revsing enn sekt, kann Fiskiveiðieftirlitið við einum sektaruppskoti boða frá, at málið kann verða avgjørt uttan rættarmál, um tann, ið hevur framt brotið, játtar seg sekan í brotinum og váttar at gjalda sektina sambært sektaruppskotinum innan nærri ásetta freist.
*Stk. 3.* Reglurnar í rættargangslógini, um innihald í ákæruriti í løgreglumálum og reglurnar um, at ein ákærdur ikki hevur skyldu at geva frágreiðing, verða samsvarandi nýttar viðvíkjandi sektaruppskotum.
*Stk. 4.* Góðtekur tann, ið hevur framt brotið, sektina, fellur rættarsóknin burtur.
*Stk. 5.* Somuleiðis kunnu tey, sum hava verið við til at fremja brot, fáa fráboðan um, at málið kann verða avgjørt uttan rættarmál við góðtøku av sektaruppskoti sambært stk. 1.

*Gildiskoma og skiftisregla o.a.*

**§ 12.** Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. januar 2020.

**§ 13.** Í løgtingslóg nr. 83 frá 25. mai 2009 um aling av fiski v.m., sum broytt við løgtingslóg nr. 128 frá 14. desember 2012 og løgtingslóg nr. 50 frá 30. apríl 2018, verður § 18, stk. 4 strikað.
*Stk. 2.* Skrásetingar og fráboðanir fyri 2019, sambært § 18, stk. 4 í løgtingslóg um aling av fiski v.m., skulu í seinasta lagi 1. apríl 2020 latast Havstovuni.

**§ 14.** Í løgtingslóg nr. 49 frá 30. apríl 2018 um djóravælferð verður í § 11, nr. 5 “kóp og onnur” strikað. Nr. 6-8 verða eftir hetta nr. 5-7.

## Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

### 1.1. Orsakir til uppskotið

Alt havsins tilfeingi eigur at verða varðveitt og gagnnýtt burðardygt, lívfrøðiliga og búskaparliga. Í føroyskum sjógvi eiga Føroyar rættin til at gagnnýta alt livandi sjófeingi, og hetta fevnir umframt fisk eisini um havsúgdýr sum hval og kóp.

Lógaruppskotið er gjørt fyri at skipa kópaveiðu við Føroyar. Lógaruppskotið umfatar Pinnipedia – øll sløg av kópi umframt roysning.

Láturkópur er einasti kópur, sum nørist í Føroyum. Kópurin livir við Føroyar alt árið og leggur í látrum fram við landi. Láturkópurin verður mettur ikki at ferðast millum lond í Norðuratlantshavi, men er ein staðbundin føroyskur stovnur.

Áður var steinkópur eisini kring Føroyar, men hann er útdeyður í 19. øld umleið ár 1850 og kemur so at siga ikki fyri og sæst nærum ikki við Føroyar í dag.

Veiða av kópi og hvali hevur mestur verið í Føroyum síðan landnámstíð í 8. øld. Láturkópur var veiddur í nøringartíðini frá seinast í september, og farið var til látra at sláa kóp. Henda veiða helt fram til byrjanina av 19. øld.

Kópur verður ikki longur veiddur í Føroyum, og kópaveiða hevur ikki verið í Føroyum í nýggjari tíð. Alifeløg hava tó tikið kóp á føroysku firðunum, um hann ger skaða á aliútgerð. Fyri at tryggja, at vit varðveita hetta tilfeingið, verður kópaveiða frameftir skipað soleiðis, at veiða og tøka krevur serstakt loyvi, og at boðast skal frá allari veiðu og tøku. Loyvi kann latast til burðardygga kópaveiðu, og alifeløg kunnu fáa loyvi at taka kóp í sambandi við alivirksemi.

Ein umsitingarætlan eigur at gerast fyri føroyska kópastovnin, ið fyrst og fremst skal staðfesta, hvussu stórur stovnurin er, og hvussu nógv verður tikið burturúr honum, og at øll tøka og veiða skal vera grundað á meginregluna um burðardygd.

Í USA er komin lóggáva í gildi, The Marine Mammal Protection Act (MMPA), sum setir krøv til lond, sum útflyta fisk og fiskavørur til USA. Krøvini eru viðvíkjandi hjáveiðu av havsúgdýrum í fiskiskapi og viðvíkjandi avlíving av kópi í sambandi við alivirksemi. Skal laksur útflytast til USA, skal landið seta bann fyri tilætlaðari avlíving av kópi í sambandi við alivirksemi. Tað slepst valla undan, at kópur í ein ávísan mun verður dripin, ger hann skaða á aliútbúnað, men tað skal vera innan fyri skipaðar karmar og lívfrøðiliga burðardygt.

### 1.2. Galdandi lóggáva

Eingin lóg er í Føroyum um kóp.

Eftir galdandi lóggávu er veiða av villini dýrum loyvd, er veiða ikki bannað við ella sambært lóg.

Djóravælferðarlógin ásetir forboð fyri skjóting av “kópi og øðrum størri havdýrum við høgli”. Loyvt er at skjóta kóp, men ikki við høgli. Tað krevur rifluloyvi eftir vápnalógini.

Við broyting í alilógini í 2018 skulu alifeløg boða frá tali á kópi, sum verður tikin í sambandi við alivirksemi, ella sum av øðrum orsøkum doyr í sambandi við alivirksemi.

### 1.3. Endamálið við uppskotinum

Endamálið við lógaruppskotinum er at skipa kópaveiðu við Føroyar og aðra tøku av kópi og at fáa eina serstaka lóg, sum fevnir um havsúgdýr av slagnum Pinnipedia – kópur og roysningur. Vit hava frammanundan lóg um hvalaveiði og lóg um grind og annan smáhval.

Kópur verður ikki veiddur í Føroyum, og kópaveiða hevur ikki verið í Føroyum í nýggjari tíð.

Tá aling av laksi og síli tók seg upp á føroysku firðunum seinast í 1970-árunum, ynsktu alarar at fáa loyvi at skjóta kóp, sum kom nær alibrúkum. Kópurin kann ávirka trivnaðin hjá fiskinum, og kópur kann eisini gera seg inn á aliringarnar og skræða hol á nótina, so kópurin fer inn at eta laksin, ella laksur sleppur út.

Í djóraverndarlógini frá 1985 er sett, at ikki er loyvt at skjóta kóp og størri havdýr við høgli, og hetta er framhaldandi í nýggju djóravælferðarlógini frá 2018. Loyvt er at skjóta kóp, men ikki við høgli. Tað krevur rifluloyvi eftir vápnalógini.

Vápnalóg kom í gildi í Føroyum í 1969, og har eru avmarkingar um, hvør kann fáa loyvi at hava riflu. Fyri at geva alarum møguleika at skjóta kóp, sum kemur nær alibrúkum, hevur landfútin givið alarum rifluloyvi eftir vápnalógini at nýta til at avlíva kóp við alibrúk.

Støðan er sostatt, at kópur verður ikki veiddur við Føroyar. Kópur verður einans tikin við alibrúk, og kann/skal tá einans skjótast við riflu. Til hetta endamál fáa alarar serstakt loyvi frá landfútanum at skjóta kóp við riflu nær alibrúkum.

Stovnurin av láturkópi var fyrr møguliga uml. 3.000 kópar, men verður nú mettur at vera umleið 1.000 – 2.000 í tali. Nógvur kópur var tikin frá 1963-1967, tá virðisløn varð latin fyri hvønn dripnan kóp, men síðan henda skipan steðgaði, hevur eingin kópaveiða verið. Vitanin um stovnin er ikki stór, og hagtøl fyri tiknan kóp hava ikki verið savnað. Tí er neyðugt at fáa meiri vitan um kópastovnin, og øll veiða og tøka má vera burðardygg.

Føroyar eru partur av Norðuratlantisku nevndini fyri havsúgdýr, NAMMCO, sum er økisbundið samstarv um vernd, umsiting og gransking av havsúgdýrum í Norður Atlantshavinum. Vísindanevndin hjá NAMMCO veitir ráðnum og umsitingarnevndunum hjá NAMMCO vísindaliga ráðgeving um hvala- og kópastovnar. Tað hevur verið ynski um at fáa eina stovnsmeting av kópastovninum við Føroyar. Til hetta krevjast kanningar av ferðing og teljingar av láturkópi kring Føroyar. Arbeitt hevur verið við at fáa hagtøl yvir skotnan kóp kring alibrúk, og ein skipan er fingin, so alarar skulu lata hesi tøl inn til føroyskar myndugleikar. Talið av skotnum kópum kring alibrúk var mett at vera uml. 100-200 árliga, men er minkað seinastu árini niður í uml. 50-100 árliga.

### 1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum

Við lógaruppskotinum verður veiða og tøka av kópi skipað. Loyvi kann veitast til burðardygga kópaveiðu, eftir ummæli frá Havstovuni, og rætturin til burðardygga gagnnýtslu av havsins tilfeingi verður staðfestur.

Um kópur ger seg inn á alibrúk á einum alifirði, kann loyvi veitast at taka kóp á hesum alibrúki. Á tann hátt kann alifelagið vísa á, um fiskurin kemur frá einum alibrúki, sum hevur loyvi at taka kóp, ella frá einum alibrúki, har eingir trupulleikar eru av kópi, og kópur ikki verður tikin í sambandi við alivirksemi. Hesar upplýsingar kann alifelagið nýta í sambandi

við útflutning av laksi, nú USA hevur sett í gildi krøv um avlíving av havsúgdýrum í sambandi við alivirksemi.

**1.5. Ummæli og ummælisskjal**
Lógaruppskotið hevur verið til ummælis hjá Vørn, Havstovuni, Bjarna Mikkelsen á Náttúrugripasavninum, Signar Petersen, djóralækna, Havbúnaðarfelagnum, Føroya landfúta, Uttanríkis- og vinnumálaráðnum, Heilsu- og innlendismálaráðnum, Løgmansskrivstovuni, Grindamannafelagnum, Bóndafelagnum og Óðalsfelagnum.

Hoyringarsvar komu frá Vørn, Óðalsfelagnum, Bóndafelagnum, Bjarna Mikkelsen á Náttúrugripasavninum, Havbúnaðarfelagnum, Uttanríkis- og vinnumálaráðnum, Herbert Olsen og Føroya landfúta.

Sambært **Vørn** var lógaruppskotið orðað soleiðis, at tað einans er loyvt at veiða ella drepa kóp við ávísum skotvápnum, ið landsstýrismaðurin kann áseta reglur um í kunngerð. Tí mælir Vørn til, at ístaðin fyri at ramsa upp allar teir hættir, ið ikki eru loyvdir at veiða ella drepa kóp við, at áseta greitt í lógina, at kópur kann einans veiðast ella drepast við ávísum skotvápni. Landsstýrismaðurin kann í kunngerð áseta treytir til skotvápnið.

Til henda partin av hoyringarsvarinum frá Vørn skal Fiskimálaráðið boða frá, at tað við hesum uppskoti bara er loyvt at veiða og drepa kóp við skotvápni, ið lýkur treytirnar í § 6, stk. 3, uttan so at loyvi er fingið til vega frá landsstýrismanninum sambært § 6, stk. 4. Sostatt hevur Fiskimálaráðið í ávísan mun tillagað uppskotið eftir viðmerkingunum frá Vørn.

Harafturat sigur Vørn, at uppskotið ikki viðger, hvussu kópur, ið verður dripin, skal handfarast. Vørn mælir til at seta eina grein inn í lógina, ið viðger, hvussu dripin kópur skal burturbeinast. Vanligt er, at kópur, sum verður dripin á sjónum, søkkur á botn. Fiskimálaráðið tekur undir við hugskotinum, men møguliga eigur tílík regulering at skipast í aðrari lóggávu, men spurningurin er, um tað er ein stór umhvørvislig avbjóðing, at lívrunnið tilfar endar í havinum og verður skolað burtur við tíðini.

Vørn ynskir eisini, at lógin heimilar einum avgreiðslugjaldi fyri at útskriva loyvir. Tað er tikið til eftirtektar og ásett í § 8.

Víðari verður mælt til at seta sum treyt í hvørjum einstøkum føri, at umsøkjari hevur galdandi vápnaloyvi. Fiskimálaráðið hevur broytt lógartekstin samsvarandi, og tískil skulu umsøkjarar, áðrenn teir fáa endaligt loyvi, hava galdandi vápnaloyvi. Um umsøkjari ikki hevur tað, tá ið søkt verður, kann Fiskimálaráðið, ella tann, ið Fiskimálaráðið heimilar til tess, geva eina treytaða tilsøgn, til neyðugt vápnaloyvi er fingið til vega.

Vørn mælir eisini til at seta inn í ásetingina, at rættindahavari skal boða frá tali av kópi, ið verður veiddur, til tann myndugleika, ið útskrivar kópaloyvi. Hetta fyri at tann, ið útskrivar loyvið, hevur eftirlit við og innlit í, hvussu nógvur kópur verður veiddur. Hesum hevur Fiskimálaráðið eisini gingið á møti, sbr. § 3, stk. 3 og § 4, stk. 4.

Vørn skrivar, at § 4, stk. 1, 1. pkt., at alifeløg við laksaaliloyvi kunnu fáa loyvi at drepa kóp, sum ger skaða á aliútbúnað ella útgerð o.a., sum verður brúkt innan aling. Henda orðing leggur upp til, at tað ikki er loyvt at drepa kóp, fyrr enn skaðin er gjørdur. Vørn metir tí, at tað er meira skynsamt at umorða ásetingina soleiðis, at alifeløg eisini kunnu fáa loyvi at drepa kóp, sum er til ampa fyri alingina. Um tað gerst eitt krav, at tað ikki er loyvt at drepa kóp, fyrr

enn skaðin er hendur, er lítið vunnið við hesum loyvinum. Hesum hevur Fiskimálaráðið tikið undir við í § 4, stk. 1, eins og Fiskimálaráðið, eftir tilmæli frá Vørn, hevur broytt orðingina ”laksaaliloyvi” til ”aliloyvi”, soleiðis at hædd er tikin fyri møguligari aðrari framtíðar aling, sum ikki er laksaaling, og hesi tí fáa sama møguleika at drepa kóp, sum er til ampa fyri alingina.

Vørn skrivar, at orðingin í § 4, stk. 2 var ógvuliga fevnandi, og legði hon upp til, at ein og hvør kann skjóta kóp fyri alifelag við loyvi at skjóta kóp, so leingi viðkomandi lýkur treytirnar í vápnalógini. Vørn mælir tí heldur til at nýta eina líknandi skipan, ið er kend frá innvigingarskipanum. Fyri at fá loyvi til at innviga fisk, er krav um, at navngivnir ábyrgdarpersónar verða upplýstir fyri myndugleikanum, og hava hesir ábyrgdina av innvigingini hjá ávísa felagnum. Fyri at alifelag skal fáa loyvi, átti at verið treyt fyri loyvinum, at einans navngivnir ábyrgdarpersónar, ið lúka treytirnar í vápnalógini, kunnu skjóta kóp á ávísa aliøkinum. Hetta er tikið til eftirtektar og broytt samsvarandi, sbr. § 4, stk. 2.

Lógaruppskotið hevur ongar ásetingar um ótilætlað dráp av kópi. Vørn metir, at tað hevði verið skynsamt við eini áseting viðvíkjandi ótilætlaðum drápi av kópi. Til hetta skal Fiskimálaráðið boða frá, at revsireglurnar eru broyttar soleiðis, at tað krevst minst grovt ósketni, áðrenn heimild er fyri at revsa, og tískil verður mett, at hædd er tikin fyri ótilætlaðum drápi. Vørn mælir til at seta inn í revsiásetingarnar, at um talan er um endurtøkubrot, kann revsingin herðast. Hetta er eisini gjørt.

At enda skrivar Vørn, at teimum verður álagt at hava eftirlit við lógini. Vørn vísir á, at tað kann verða ógvuliga trupult at hava eftirlit við, um alifeløgini fylgja lógini, tá tey drepa kóp á aliøkinum. Tað eru strong heilsufrøðilig krøv á aliøkjunum, og skipini hjá Vørn sigla vanliga ikki í aliøkjum. Harafturat eru aliøki á landi avbyrgd, og krevst loyvi fyri at sleppa inn. Vørn mælir til at geva heimild til, at Fiskiveiðieftirlitið, við samleikaváttan og uttan rættarúrskurð, kann fara inn á aliøki at gera tænastukanningar. Líknandi heimild er at finna í kapitli 14 í løgtingslóg um fyrisiting av sjófeingi. Hetta er tikið til eftirtektar og tillagað samsvarandi í § 7.

**Føroya landfúti** viðmerkir, at tað eigur at ganga fram í lógini, hvørjar ásetingar í vápnalógini skulu lúkast, og hetta eigur at skrivast saman í § 6, stk. 3. Fiskimálaráðið varðar ikki av vápnalógini og letur tí tann partin vera hjá Føroya landfúta, men Fiskimálaráðið hevur nágreinað krøvini til skotvápnini, ið eisini eru tey einastu, ið kópur kann skjótast við, sbr. § 6, stk. 3. Júst hvat vápn og vápnaloyvi skal til fyri at lúka hesa treyt má vera upp til avvarðandi myndugleika.

Víðari skrivar Føroya landfúti, at tað í uppskotinum ikki var heimild at revsa fyri vantandi fráboðan, tá ið kópur verður tikin. Fiskimálaráðið kann upplýsa, at hetta er tikið til eftirtektar og er nú tillagað samsvarandi, soleiðis at heimild er fyri at revsa, um fráboðanarskyldan, sambært § 3, stk. 3 og § 4, stk. 4, ikki verður hildin, sbr. § 10, stk. 1.

**Uttanríkis- og vinnumálaráðið** viðmerkir, at ásett er í § 18, stk. 4 í alilógini, at alifeløg, sum hava laksaaliloyvi, skulu, fyri hvørt aliøki sær, skráseta og boða Heilsufrøðiligu starvsstovuni frá tali á kópi, sum verður tikin í sambandi við alivirksemi, ella sum av øðrum orsøkum doyr í sambandi við alivirksemi.

Fráboðan skal eina ferð um árið sendast til Heilsufrøðiligu starvsstovuna í tí sniði, sum starvsstovan ásetir. Heilsufrøðiliga starvsstovan skal lata upplýsingarnar víðari til granskingarstovnar og myndugleikar, sum biðja um tað. Hesi viðurskifti verða eftir uppskotinum frameftir løgskipað í kópalógini. Fiskimálaráðið hevur við uppskotinum til §§ 13 og 14 gjørt fylgibroytingar í lóggávuni hjá Uttanríkis- og vinnumálaráðnum.

Til hetta skal Fiskimálaráðið boða frá, at tað eru gjørdar serligar ásetingar, ið taka hædd fyri lóggávu á økinum undir Uttanríkis- og vinnumálaráðnum, sbr. §§ 13 og 14.

**Óðalsfelagið** sigur seg onga viðmerking hava aðra enn, at tað oftani er sera trupult at avtaka forboð, sum verður sett í gildi við lóg, og tí hevði tað kanska verið betri við heimildum í kunngerð ístaðin.

**Bóndafelagið** skrivar í sínum hoyringarsvari, at kópaveiða helst hevur verið í Føroyum síðan landnám, og er veiðan á landi til hetta tilfeingið partur av teimum lunnindum, sum liggja til jørðina. Víst verður á, at á sjónum kunnu øll veiða kóp. Bóndafelagið heldur tað kann tykjast løgið at gera lóggávu um nakað, sum er óneyðugt. Víst verður á, at lítið verður veitt av kópi í Føroyum. Tey fáu, sum veiða kóp, ávirka ikki stovnin á nakran hátt.

Bóndafelagið metir harumframt, at uppskotið ger seg inn á rættin hjá øllum føroyingum at gagnnýta eitt tilfeingi, sum føroyingar hava havt møguleika at gagnnýta í øldir. Bóndafelagið vil vera við, at uppskotið ómyndugger føroyingin, sum nú skal biðja um loyvi frá almennum stovni fyri at fáa sær eitt kók av kópatvøsti og øðrum gagni, veiðan gevur. Bóndafelagið spyr, hvat tað næsta verður, nú uppskotið í ávísan mun er evnað til eftir krøvum frá fremmandum tjóðum, sum taka rættin frá føroyingum at gagnnýta ávís havsúgdjór (kóp). Bóndafelagið vil vera við, at føroyingar mugu ongantíð gera neyðsemju um okkara rætt til eina og hvørja tíð at kunna gagnnýta tað livandi tilfeingi, í hesum førinum kóp, sum er í føroyskum sjóøki. Bóndafelagið vísir á, at tjóðin eigur hesi ómissandi rættindini. Bóndafelagið heitir tí á fiskimálaráðharran um ikki at bera eitt slíkt uppskot á ting.

At enda mælir Bóndafelagið heldur landsstýrismanninum til at staðfesta rættin hjá føroyingum at veiða kóp, eins og grindalógin ger.

Fiskimálaráðið kann vísa á, at tað leingi ikki hevur verið siðvenja í Føroyum at taka kóp. Uppskotið fer at gagna okkara vinnulívi, eins og hótti kópastovnurin verður vardur. Uppskotið leggur upp til at skipa viðurskiftini soleiðis, at kópur bert kann takast, um hann er til ampa fyri alivinnuna og í samband við burðardygga veiðu. Tískil er Fiskimálaráðið ikki samt við Bóndafelagnum í, at rætturin hjá føroyingum til egið tilfeingi verður mistur. Rætturin verður bert skipaður við føroyskari lóggávu.

**Herbert Olsen** viðmerkir, at tað er vegna noktan frá fútanum um vápnaloyvi, at kópur ikki verður veiddur við Føroyar. Víst verður á, at veiða hevur ikki einans fíggjarligan týdning, men eisini mentanarligan týdning. Mett verður, at uppskotið kann fáa negativa ávirkan á aðra veiðu s.s. hvalaveiðu. Víst verður eisini á, at kópur etur av fiskatilfeinginum, og kópur er millumvertur fyri sandmaðk í fiski, og at ein ávís burðardygg veiða sostatt hevði havt eina positiva ávirkan í sambandi við tilvirking av fiski.

Fiskimálaráðið kann vísa á, at nógv bendir á, at tað í løtuni ikki er burðardygt at veiða kóp. Uppskotið forðar ikki fyri burðardyggari veiðu. Uppskotið gevur bert avvarðandi

myndugleika heimild at stýra kópaveiðuni, soleiðis at bert burðardygg veiða kann fara fram við neyðugum loyvum.

**Bjarni Mikkelsen** vísir á ymisk viðurskifti, ið lógaruppskotið ikki hevði neyvar ásetingar um. Talan var eitt nú um viðurskifti, hvussu kópaveiðan skal skipast, umsitingarætlan og innsavning av upplýsingum til granskingarendamál.

Fiskimálaráðið hevur tikið hetta til eftirtektar, og hevur sostatt orðað eina kunngerðarheimild í § 11, har landsstýrismaðurin verður heimilaður at áseta nærri reglur í kunngerð um hesi viðurskifti.

**Havbúnaðarfelagið** heldur, at tað í § 2 eigur at vera greiðari í lógartekstinum, at talan er um tilætlaða veiðu, ella tilætlað at skaða kóp. Um t.d. ein kópur ótilætlað verður skaddur við eitt alibrúk, eigur hetta ikki at kunna ábyrgdast tí, sum alibrúkið eigur.

Til hetta skal Fiskimálaráðið vísa á, at broytingar eru gjørdar í revsiásetingunum, soleiðis at talan skal í minsta lagi vera um brot, ið er framt av grovum ósketni, áðrenn heimild er fyri at revsa.

Havbúnaðarfelagið vísir á, at í § 3, stk. 1, 3. pkt. er ásett, at um veitt verður við skotvápni, skal viðkomandi lúka krøvini ásett í løgtingslóg um vápn v.m., sbr. § 6, stk. 3. Óneyðugt er at endurtaka krøv í øðrum lógum, sum eru galdandi parallelt, eins og ivi kann standast um júst hvørji krøv í vápnalógini, sipað verður til. Havbúnaðarfelagið mælir tí til at strika § 3, stk. 1, 3. pkt.

Fiskimálaráðið skal boða frá, at tá ið uppskotið fór til hoyringar stóð bara, at umsøkjari skal lúka krøv í vápnalógini. Fiskimálaráðið hevur síðani, við støði í norskari lóggávu, sett krøv til skotvápn, soleiðis at tey hava eina nóg stóra megi til, at kópur doyr beinanvegin, hóast tann, ið skjýtur - av misgáum - skuldi rakt kópin soleiðis, at hann ikki doyr beinanvegin. Tí skal umsøkjari skjalprógva fyri Fiskimálaráðnum, ella tí, ið Fiskimálaráðið heimilar til tess, at neyðugt loyvi er fingið til vega til júst tílíkt skotvápn, ið sambært lógini er tað einasta, ið kann brúkast at skjóta kóp við, sbr. § 6, stk. 3.

Havbúnaðarfelagið mælir til, at § 4, stk. 1 verður orðað soleiðis:

> ”§ 4. Hóast bannið sambært § 2, kann landsstýrismaðurin, ella tann, ið landsstýrismaðurin heimilar til tess, eftir skrivligari umsókn frá alifelag, sum hevur aliloyvi, geva loyvi til at taka kóp, við atliti til djóravælferð fyri alifiskin ella kópin v.m. Loyvið skal tó vera treytað í mun til ávíst aliøki o.a. Loyvi eru tíðaravmarkað í upp til fimm ár.”

Fiskimálaráðið er ikki samt við Havbúnaðarfelagnum um uppskotið til nýggja orðing, ið fyri tað fyrsta er orðað sum ein standardur, og harvið torfør at umsita og revsa, tí nær er nakað djóravælferð í mun til fisk? Tískil heldur Fiskimálaráðið fast í, at talan skal vera um kóp, ið er til ampa fyri alibrúk, áðrenn loyvi kann verða givið at skjóta kóp.

Havbúnaðarfelagið tekur sum givið, at tað ber til hjá einum alifelag at heita á myndugleikan um at fáa tikið loyvið aftur, áðrenn tey 5 árini eru farin, um hetta gerst neyðugt, eitt nú í samband við útflutning til USA.

Til hetta kann Fiskimálaráðið bert vísa á óskrivaðu meginregluna um afturtøku av fyrisitingarligum avgerðum, ið eru til fyrimuns fyri borgaran.

Í mun til § 4, stk. 3 vísir Havbúnaðarfelagið á, at tað sambært ASC-standardinum - sum fleiri føroysk alifeløg fylgja - ber ikki til at nýta ávísa útgerð, eitt nú sonevndar "kópaforskrekkjarar" at halda kópum burtur frá alibrúkum. Mælt verður tí til, at § 4, stk. 3 verður orðað soleiðis:

> "*Stk. 3.* Áðrenn alifelag tekur kóp, skal alifelagið hava tikið støðu til, um onnur hóskandi og minni víðfevnd tiltøk kunnu setast í verk fyri at røkka teimum atlitum, sum eru nevnd í stk. 1, 1. pkt."

Fiskimálaráðið er ikki samt við Havbúnaðarfelagnum í, at proportionalitetsmetingin skal vera latin vinnuni at taka støðu til. Við atliti at verju av kópastovninum, ið er eitt av høvuðsendamálunum við lógini, skal vinnan til eina og hvørja tíð prógva, at hóskandi og minni víðfevnd tiltøk eru sett í verk, áðrenn kópur verður skotin, s.s. at nótin hevur neyðugu styrkina, og útgerðin annars er av tílíkum slagi, at kópur ikki hevur lætt við at skaffa sær atgongd til alifiskin.

Viðvíkjandi viðmerkingini frá Havbúnaðarfelagnum um at strika í alilógini viðvíkjandi fráboðanarskylduni, so er hetta tikið til eftirtektar, sbr. eisini viðmerkingarnar frá Uttanríkis- og vinnumálaráðnum. Fiskimálaráðið tekur ikki undir við, at vinnan einaferð um árið skal lata Havstovuni skrásetingar. Fyri at tryggja eitt støðugt og neyvt eftirlit, verður skotið upp, at skráseting og fráboðan til Havstovuna skal fara fram beinanvegin.

Havbúnaðarfelagið vísir á í mun til § 5, at tað er ein "inntrívandi" avgerð at taka eitt loyvi aftur, og mælt verður tí til, at orðingin av § 5 verður broytt, so loyvið bert kann takast aftur, um talan er um grov ella endurtikin brot. Hesum er Fiskimálaráðið ikki samt við. Um einki stóð í lógini, hevði Fiskimálaráðið, sum myndugleiki á óskrivaðum grundarlagi, kortini kunnað tikið loyvið aftur, um treytir ikki verða hildnar, tó við virðing fyri fyrisitingarrættinum annars s.s. proportionalitetsprinsippinum. Mett verður ikki, at sami mátistokkur eigur at galda fyri tílíkar fyrisitingarligar avgerðir, sum eru galdandi fyri revsirættarliga partin.

Havbúnaðarfelagið vísir á, at vanliga orðingin er ikki at "drepa" kóp, men at "taka" kóp, og mælt verður til at nýta hesa orðing í kunngerðini. Á sama hátt eigur "dráp" at broytast til "tøka". Fiskimálaráðið hevur tilvitað valt at brúka orðingina at drepa kóp og at veiða kóp, tí endamálini eru ymisk, hóast kópurin í báðum førum doyr. Vinnan drepur kóp, men veiðir hann ikki. Harumframt verður eisini skilt ímillum hugtøkini veiða, fanga og drepa í norskari lóggávu. Til dømis kann kópur blíva skaddur ella fangaður uttan at verða veiddur ella dripin.

Havbúnaðarfelagið heldur tað vera burturvið at kunna revsa við fongsli fyri brot á kunngerðina. Soleiðis sum møgulig brot kunnu vera háttað, eigur revsing við sekt at vera nøktandi. Um tað snýr seg um brot viðvíkjandi djóravælferð, er revsiheimildin frammanundan í djóravælferðarlógini. Fiskimálaráðið hevur tillagað revsiheimildina. Talan er um eina revsirammu. Um eitt mál eisini skuldi verið fevnt av djóravælferðarlógini og kópalógini, er tað tann lógin, ið hevur hægst revsing, ið verður revsirættarliga ábyrgdargrundarlagið, t.v.s. djóravælferðarlógin, tí har er revsiramman sekt og upp til 1 ára fongsul, sbr. § 30, stk. 1. Um revsiramman skuldi verið tann sama, er kópalógin allarhelst *lex specialis* og *lex posterior* í mun til djóravælferðarlógina, ið er *lex generalis*.

Havbúnaðarfelagið mælir til at strika tann partin, ið viðvíkur Vørn. Hesum er Fiskimálaráðið als ikki samt í, tí Vørn er eftirlitsmyndugleiki sambært hvalalógini og fiskivinnulóggávuni, og sostatt verður Vørn eisini eftirlitsmyndugleiki á hesum øki.

Havbúnaðarfelagið ynskir eina skiftistíð í sambandi við gildiskomuna. Hesum hevur Fiskimálaráðið gingið á møti soleiðis, at lógin kemur í gildi 1. jan. 2020. Annars hevði einki verið í vegin fyri, at Fiskimálaráðið í fyrstu atløgu gav eina treytaða tilsøgn, til øll viðurskifti hjá umsøkjarum vóru komin í rættlag.

**Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum**

**2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur**
Nei.

**2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur**
Fyri Fiskimálaráðið og Vørn kann eitt sindur av umsiting av loyvum hugsast.

**2.3. Avleiðingar fyri vinnuna**
Uppskotið ger tað strangari at drepa kóp, men uppskotið hevur jaligar avleiðingar fyri alivinnuna, sum við nýggju rættarstøðuni fær betri atgongd til amerikanska marknaðin. Harumframt skulu kópadráp boðast Havstovuni. Tað kann vera ein ávís íløga, ið skal gerast fyri at fáa neyðugt vápn til endamálið.

**2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið**
Uppskotið má metast at hava jaligar umhvørvisligar avleiðingar, tí økið verður fyri tað fyrsta regulerað. Harnæst gerst eftirlitsmøguleikin betri við skrásetingarskylduni og fráboðanarskylduni. Tað er sum meginregla bannað at fanga, drepa, veiða ella at skaða kóp. Dráp og veiða krevja loyvi frá myndugleikunum, og veiða kann bert fara fram, um hon er burðardygg. Brot á lóggávuna kann revsast.

**2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum**
Nei.

**2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir**
Nei.

**2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum**
Føroyar taka lut í millumtjóðasamstarvinum um havsúgdýr í NAMMCO (North Atlantic Marine Mammal Commission), sum viðger støðuna hjá hvali og kópi í Norðuratlantshavi. Vísindanevndin hjá NAMMCO veitir vísindaliga ráðgeving um m.a. føroyska kópastovnin, og kópastovnurin verður viðgjørdur í umsitingarnevndini fyri kóp.

Mett verður ikki, at uppskotið fær fíggjarligar, umsitingarligar, umhvørvisligar ella aðrar avleiðingar.

**2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar**
Mett verður, at uppskotið kann nema við rættin til privatlívið sambært EMRS art. 8 (1) í mun til eftirlitið hjá Vørn, men henda verjan er tó ikki eins væl vard og privatlívið annars, sbr. Jens Elo Rytter, Den Europæiske Menneskerettihedskonvention – og dansk ret, Forlaget Thomson (2006), bls. 205: Privatlivsbeskyttelsen gælder ifølge EMD i et vist omfang også i

arbejdsfæren og indenfor kommerciel virksomhed; begrundelsen herfor er som Domstolen udtalte i Niemietz (1992, para. 29), jf. Også Halford (1997, para. 42) og Amann (2000, para. 65), at: "it is, after all, in the course of their working with others that the majority og people have a significant, if not the greates, opportunity of developing relationskips with the outside world." Mett verður tó, at tílíkt inntriv kann legitimerast undir EMRS art. 8 (2), tí talan er um eitt lógarheimilað inntriv, sum er neyðugt í einum fólkaræðisligum samfelag til tess at byrgja fyri brotum á kópalógina.

**2.9. Marknaforðingar**
Ongar kendar marknaforðingar eru. Tvørturímóti fer ein tílík rættarstøða at bøta um møguleikarnar hjá alivinnuni at útflyta til amerikanska marknaðin.

**2.10. Revsing, útpanting, sektir ella onnur størri inntriv**
Lógaruppskotið hevur eins og djóravælferðarlógin ásetingar um revsing frá sekt og upp til 4 mánaðir fongsul. Um herðandi umstøður eru, kann revsingin hækka upp í 1 ár.

**2.11. Skattir og avgjøld**
Nei.

**2.12. Gjøld**
Tað verður heimilað at taka gjald fyri avgreiðslu av loyvum.

**2.13. Áleggur lógaruppskotið fólki skyldur?**
Uppskotið áleggur alibrúkum við aliloyvi og øðrum, ið fáa loyvi at drepa kóp, at boða Havstovuni og landsstýrismanninum, ella tí, ið landsstýrismaðurin heimilar til tess, frá hesum. Havstovan skrásetir síðani upplýsingarnar. Hetta er neyðugt til tess at røkja vitskaplig endamál og at tryggja burðardyggleikan. Harumframt skulu hóskandi og minni víðfevnd stig takast, áðrenn neyðugt gerst at drepa kóp. Dømi um hetta kann vera sterkari útbúnaður. Harumframt áleggur lógaruppskotið alifyritøkum at hjálpa eftirlitsmyndugleikanum við sínum kanningararbeiði.

**2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein annan enn landsstýrismannin ella til kommunur?**
Sambært lógaruppskotinum er tað sum meginregla landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum, ið letur loyvi og kann taka tey aftur. Hesar heimildir kann hann lata Fiskiveiðieftirlitinum, sum longu hevur eftirlit við umfatandi lóggávu undir málsøkinum hjá Fiskimálaráðnum. Avgerðir, sum Fiskiveiðieftirlitið tekur sambært hesi lóg, kunnu kærast til Fiskimálaráðið sambært óskrivaðu meginregluni um administrativa rekurs í hierkiskt skipaðum myndugleikum.

**2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?**
Ja, heimilað verður Fiskiveiðieftirlitinum at gera tænastukanningar inni á aliøkjum.

**2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?**
Um loyvi skal fáast til vega, mugu persónar fáa sær neyðugt vápnaloyvi til endamálið, og vápnið skal lúka krøvini ásett í § 6, stk. 3.

**2.17. Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum**

| | Fyri landið ella landsmyndug-leikar | Fyri kommunalar myndugleikar | Fyri pláss ella øki í landinum | Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Ja |
| Umsitingarligar avleiðingar | Ja | Nei | Nei | Nei | Ja |
| Umhvørvisligar avleiðingar | Ja | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur | Ja | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Sosialar avleiðingar | | | Nei | Nei | |

## Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

### 3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

**Til § 1**
Løgtingslógin fevnir um øll sløg av kópi (Pinnipedia). Til tess at verja kóp, skal kópahugtakið skiljast breitt til eisini at fevna um eitt nú nósar og roysning. Landafrøðiliga er lógin galdandi á føroyskum landøki og í føroyskum sjógvi. Í føroyskum sjógvi skulu skiljast sjóleiðirnar innan fyri føroyska fiskimarkið, soleiðis sum tað er ásett í fyriskipan um fiskiveiðiumveldi Føroya.

**Til § 2**
Endamálið við lógini snýr seg yvirskipað um, at nýtslurætturin at gagnnýta ognina hjá føroysku tjóðini er burðardyggur og verður skipaður eftir tí, ið náttúran tolir. Lívfrøðiliga snýr tað seg um, hvussu vit røkja, gagnnýta og verja kópatilfeingið.

Greinin ásetir meginregluna, at tað bert er loyvt at drepa og veiða kóp við loyvi sambært §§ 3 og 4. Ásetingin hevur íblástur frá § 4 í norsku “Forskrift om regulering av sel på norskekysten.”

**Til § 3**
Ásetingin í § 3 viðvíkur burðardyggari veiðu. Tað er eitt grundleggjandi prinsipp, at Føroyar hava fullan ræðisrætt yvir sínum sjófeingi, og tískil verður latið upp fyri einum møguleika fyri burðardyggari kópaveiðu. Áðrenn farast kann í gongd við burðardygga kópaveiðu, skal loyvi fáast til vega frá landsstýrismanninum ella tí, ið landsstýrismaðurin heimilar til tess.

Málið byrjar við, at skrivlig umsókn verður latin viðkomandi myndugleika, sum síðani sendir tilfarið til ummælis hjá Havstovuni, ið er avvarðandi fakkunnleiki viðvíkjandi burðardyggleika. Er umsóknin ikki nóg væl greidd, kann landsstýrismaðurin biðja viðkomandi umsøkjara um fleiri ella nágreiniligari upplýsingar. Síðani verður avgerð tikin,

hvørt umsóknin skal gangast á møti ella ikki. Um vápnaloyvi ikki er fingið til vega, kann landsstýrismaðurin geva eina treytaða tilsøgn, til viðurskiftini eru fingin í rættlag.

Loyvið skal vera treytað í mun til tal av kópi, aliøki, tíð á árinum o.a. Leggjast kann afturat, at loyvið sambært hesi lóg gevur ikki rætt til privata ogn, og tá má neyðug heimild fáast til vega frá viðkomandi rættindahavara.

Tað hevur ikki verið siðvenja í Føroyum at veiða kóp, og metingar benda á, at kópastovnurin ikki er væl fyri, og tí kann roknast við, at tað bert í undantaksføri verður givið loyvi til kópaveiðu.

Sambært stk. 3 skal boðast frá tali á kópi, sum verður tikin. Fráboðanin skal fara fram beinanvegin, og síðani verður hon skrásett hjá avvarðandi myndugleikum.

**Til § 4**
Hóast meginregluna sambært § 2 kann landsstýrismaðurin eftir skrivligari umsókn loyva ávísum alibrúki at drepa kóp, sum er til ampa fyri aliútbúnað og útgerð, sum verður brúkt innan aling. Aliútbúnaður og útgerð fevnir um allar fysiskar lutir, sum verða nýttir í virksemi, sum er fevnt av lógini, og fevnir um fastar og leysar lutir uttan mun til stødd og slag.

Hesin møguleikin er settur inn í lógina fyri at taka hædd fyri einum tørvi hjá alivinnuni. Loyvi skulu vera tíðaravmarkað í upp til 5 ár. Heimildin at geva loyvi kann latast undirliggjandi stovnum undir málsøkinum hjá Fiskimálaráðnum. Í tann mun, at tað verður tað, er tað viðkomandi stovnur, sum tekur avgerð um hetta. Loyvið skal vera treytað í mun til tal av kópi, aliøki, tíð á árinum o.a.

Stk. 2 ásetir, at bert kann verða dripið við skotvápni, og viðkomandi, ið fremur skjótingina, skal harumframt lúka krøv ásett í løgtingslóg um vápn v.m., eins og viðkomandi skal vera navngivin.

Tað er Føroya landfúti, ið veitir vápnaloyvi. Sambært § 6, stk. 3 kann kópur bert skjótast við vápni, ið lýkur ávís krøv.

Ásetingin í stk. 3 merkir, at tað skal vera neyðugt at drepa kópin, og tískil skal viðkomandi hava roynt hóskandi minni víðfevnd stig enn at drepa kópin til tess at steðga skaða á aliútbúnað ella útgerð o.a. Her kann t.d. talan vera um sterkari aliútbúnað, ella aliútbúnað, sum, vegna serliga nót ella hædd, forðar kópi at koma innum.

Sambært stk. 4 skal boðast frá tali á kópi, sum verður tikin í sambandi við alivirksemi, ella sum av øðrum orsøkum doyr í sambandi við alivirksemi. Sostatt skal boðast frá, hóast alifelagið ikki sjálvt hevur dripið kópin. Fráboðanin skal sendast beinanvegin, og síðani verður hon skrásett hjá avvarðandi myndugleikum.

**Til § 5**
Ásetingin merkir, at landsstýrismaðurin, ella tann, ið landsstýrismaðurin heimilar til tess, kann beinanvegin taka aftur givin loyvi, um brot er framt á reglurnar í hesi løgtingslóg, ella reglur, ásettar við heimild í hesi løgtingslóg. Hóast tað ikki hevði staðið í lógini, hevði tað kortini borið til á óskrivaðum grundarlagi at tikið eina tílíka tilsøgn aftur, men, tá tað stendur beinleiðis orðað í lógini, eru treytirnar kendar frammanundan, eins og reaktiónsmøguleikarnir eru kendir. Harumframt kann revsast sambært lógini, um brotið er framt av grovum ósketni

ella tilætlað. Ta revsirættarligu treytina er ikki neyðugt at lúka, tá ið talan er um fyrisitingarligar avgerðir um afturtøkur av loyvum.
Sum tað minna í tí meira kann avvarðandi myndugleiki samsvarandi propotionalitetsprinsippinum eisini geva ávaring ella átalu o.tíl. fyri brot á lógina.

**Til § 6**
Ásetingin í § 6, stk. 1 er ein rættarligur standardur, ið merkir, at veiða ella dráp av kópi sambært §§ 3 og 4 skal fara fram við størsta varsemi og fremjast á djóravælferðarliga fullgóðan hátt. Hugtakið er tikið úr galdandi djóravælferðarlóg.

Ásett er eisini, at tað er bannað at fanga, veiða, drepa, ella at skaða kóp við nýtslu av línu, gørnum, saksi, rúsum ella øðrum sløgum av fellum.

Lógin ásetir greitt, hvørji krøv, ið skotvápn skulu lúka. Hetta er av djóraetiskum ávum til tess at tryggja í mest møguligan mun, at kópurin doyr beinanvegin, um hann verður skotin.

Í stk. 4 verður heimilað landsstýrismanninum at gera frávik frá kravinum um at skjóta við ávísum vápni, um tað fer fram á djóravælferðarliga fullgóðan hátt.

**Til § 7**
Álagt verður alifelag at tryggja atkomumøguleikar til fólk frá eftirlitinum, soleiðis at hesi altíð kunnu koma inn á aliøki og hartil krevja atgongd til høli at gera tænastukanningar. Talan er sostatt um eina serstaka heimild frá dupulta heimildarkravinum sambært § 72 í grundlógini.

Tá eftirlitsmyndugleikin ger kanningar, hava tey, ið hava ábyrgd av tí, ið kannað verður, skyldu at vera myndugleikanum til hjálpar. Her verður hugsað um virkisleiðarar, goymsluleiðarar o.tíl. Hesi hava øll skyldu at vera til hjálpar. Harumframt skal eftirlitið vera framt í samsvari við galdandi heilsufrøðilig krøv.

**Til § 8**
Við hesari grein verður lógarheimild givin til at krevja gjald fyri avgreiðslu av loyvum. Av tí, at talan er um gjald fyri eina ítøkiliga tænastu, er talan ikki um skatt.

**Til § 9**
Greinin er ein kunngerðarheimild hjá landsstýrismanninum, har landsstýrismaðurin kann áseta nærri reglur um at skipa kópaveiðuna. Til dømis kunnu reglur vera um at savna lívfrøðiligt tilfar frá kópi skotin við alibrúk, til tess at fáa meira vitan um lívfrøðina hjá kópi (t.d. kjaftur, kynsgøgn, magi, vevnaður), soleiðis sum NAMMCO hevur viðmælt Føroyum at gera.

Føroyar eru limur í NAMMCO, ið hevur ymisk tilmæli um umsiting av láturkópi. Tað fyrsta er, at limalondini eiga at hava eina umsitingarætlan, har staðfest verður, hvørji umsitingarlig mál og burðardygg markvirði ein hevur fyri stovnin. Hetta hevur fyrst og fremst við sær, at ein leypandi neyvt fylgir gongdini í stovnsstødd, ásetir ynskilig markvirði fyri stovnin, veiðitíð, friðingartíð og átøk at halda stovninum á burðardyggum støði. Reglur um at skipa veiðuna kunnu vera ásetingar fyri tey fólk og útgerð teirra; førleikar hjá fólki, framferð, tá ið veitt verður, skráseting og innlating av sýnum (tenn, kynsgøgn, kíkur) til gransking. Hugsast kann, at tað í kunngerð kunnu ásetast kvotur fyri ávís øki, og at tað í einum loyvi bert verður givið loyvi til at skjóta eitt ávíst tal av kópi galdandi fyri eitt avmarkað tíðarskeið.

**Til § 10**
Ásett er, at brot á § 2, stk. 2, § 3, stk. 2 og 3, § 4, stk. 1-4, § 6, § 7, stk. 3, 1. pkt. og brot á reglur givnar við heimild í § 11 kunnu revsast við bót og upp til fongsul í fýra mánaðir. Talan skal vera um brot, ið er framt tilætlað ella av grovum ósketni. Um persónur fleiri ferðir verður dømdur fyri tílík brot, kann revsingin herðast í upp til 1 ára fongsul. Sostatt er ikki heimild at revsa fyri vanligt ósketni ella hendinga umstøður.

Sambært hesi áseting kunnu mál, sum verða viðgjørd eftir revsiásetingunum í hesi lóg, ella eftir revsiásetingunum í einari kunngerð, sum hevur heimild í hesi lóg, verða viðgjørd sum løgreglumál, sbr. tó § 11 viðvíkjandi fyrisitingarligum sektaruppskotum.

Hetta merkir, at løgreglan eisini kann avgreiða mál við sektaruppskoti (da: bødeforlæg) og á tann hátt sleppa undan at fara í rættin við hvørjum einstakum broti. Fortreytin er tó, at hin skuldsetti - uttanrættarliga - játtar seg sekan í brotinum og góðtekur ásettu sektina. Eisini kunnu reglurnar í rættargangslógini - lovbekendtgørelse nr. 148 af 9. marts 2004 om lov for Færøerne om rettens pleje, sum seinast broytt við lóg nr. 428 frá 3. mai 2017 - um at leggja hald á, og um rannsókn, nýtast sum í statsadvokatmálum.

Eins og í løgtingslóg um grind og annan smáhval (grindalógin) verður hildið, at uttan mun til um mál um brot á lóggávuna verða avgreidd uttanrættarliga sum løgreglumál við sektaruppskoti, sambært § 11, ella sum rættarmál, eiga linastu brotini sambært lógini og reglum, ásett við heimild í lógini, ikki at verða revsað við minni enn 7.000 kr. Er talan um álvarsom brot, har elvdur er skaði, ella nærliggjandi vandi var fyri at elva til skaða, á persónar, kóp, umhvørvi ella lutbundin virði, eigur sektarupphæddin at tvífaldast og ásetast til einar 14.000 krónur. Upphæddirnar eru nøkulunda á støði við tær, sum standa í viðmerkingunum til grindalógina, tó nakað lægri.

Við at áseta minstu sektarupphæddina til umleið 7.000 krónur, og annars at tvífalda sektina fyri álvarslig brot, ber til at tryggja, at revsingin er týðilig og sjónlig og helst kann merkjast hjá tí einstaka, um persónurin sjálvur rindar sektina.

Í førum, har sami persónur fremur lógarbrot ferð eftir ferð, og tað uttan mun til, um talan er um somu brot ella ymisk brot eftir kópalóggávuni, eigur dentur eisini at verða lagdur á hetta næstu ferð, revsað verður við sekt eftir hesi lóggávu, skilt á tann hátt, at sektin eigur at herðast fyri endurtøku, heldur enn at gerast linari ella føra til, at sami persónur tá verður revsaður við fongsli. Tá revsingin verður ásett, skal dentur tó ikki leggjast á, um viðkomandi persónur hevur framt onnur lógarbrot sambært aðrari lóggávu, sum onki hevur við kóp at gera. Sum dømi kann nevnast, at brot á ferðslulógina ikki skal hava ávirkan á ásetan av revsing fyri brot á kópalóggávuna.

Sambært stk. 4 koma løgfrøðiligir persónar, haruppií kommunur, samsvarandi undir revsiábyrgd eftir reglunum í kapitli 5 í revsilógini.

Sambært stk. 5 kunnu mál, sum verða viðgjørd eftir revsiásetingunum í hesi lóg ella eftir revsiásetingunum í einari kunngerð, sum hevur heimild í hesi lóg, verða viðgjørd sum politimál.

Sambært stk. 6 kunnu reglurnar í rættargangslógini - lovbekendtgørelse nr. 148 af 9. marts 2004 om lov for Færøerne om rettens pleje, sum seinast broytt við lóg nr. 428 frá 3. mai 2017 - um at leggja hald á, og um rannsókn, nýtast sum í statsadvokatmálum.

**Til § 11**
Stk. 1 ásetir, at tað er Fiskiveiðieftirlitið, sum hevur eftirlit við, at reglurnar í lógini, og reglur ásettar við heimild í hesi lóg, verða hildnar. Vørn er stovnur undir landsstýrismanninum í fiskivinnumálum og hevur allar fiskiveiðieftirlitsuppgávur um hendi.

Sambært stk. 2 verður heimilað eftirlitsmyndugleikanum at viðgera mál við fyrisitingarligum sektaruppskoti, um so er, at sekt verður góðtikin. Reglurnar í rættargangslógini, um at framleggja sektaruppskot, skulu fylgjast, tá ið sektaruppskot verða løgd fram við heimild í hesi lóg.

Sambært stk. 3 fær Fiskiveiðieftirlitið heimild til sjálvstøðugt at seta fram sektaruppskot. Treyt er tó, fyri at avgreiða eitt mál við fyrisitingarligum sektaruppskoti, at tann, sum hevur framt brotið, góðtekur sektina. Tað verður bert givið Fiskiveiðieftirlitinum heimild at avgera ávís nevnd brot á lóggávuna við fyrisitingarligum sektaruppskoti. Onnur brot verða latin Fútanum til víðari viðgerð og verða ikki viðgjørd við fyrisitingarligum sektaruppskoti. Mett verður, at tað er tørvur á, at Fiskiveiðieftirlitið kann avgreiða ávís mál við fyrisitingarligum sektaruppskoti. Talan er serliga um mál, sum eru einføld og greið og ikki krevja nakað serstakt, tá talan er um próvførslu o.a. Til dømis, um tað er próvfast, at onkur hevur dripið kóp uttan loyvi.

Stk. 4 ásetir, at reglurnar í rættargangslógini, lovbekendtgørelse nr. 148 af 9. marts 2004 om lov for Færøerne om rettens pleje, sum seinast broytt við lóg nr. 428 frá 3. mai 2017, um innihald í ákæruriti í løgreglumálum, og at ákærdi ikki hevur skyldu at geva frágreiðing, verða brúktar í sambandi við sektaruppskot.

Í stk. 5 verður ásett, at um sektaruppskot verður góðtikið, er málið at rokna sum endaliga avgreitt, og rættarsóknin liðug. Harumframt er ásett, at ásetingarnar í grein 83 eisini eru galdandi fyri tey, sum hava verið við til at fremja brot.

**Til § 12**
Skotið verður upp, at lógin kemur í gildi 1. jan. 2020, so tað verður givin ein ávís skiftistíð til at fáa loyvi o.a. til vega.

**Til § 13**
Í § 18, stk. 4 í alilógini er ásett, at alifeløg, sum hava laksaaliloyvi, skulu, fyri hvørt aliøki sær, skráseta og boða Heilsufrøðiligu starvsstovuni frá um tal á kópi, sum verður tikin í sambandi við alivirksemi, ella sum av øðrum orsøkum doyr í sambandi við alivirksemi. Hesi viðurskiftini verða eftir uppskotinum frameftir løgskipað í kópalógini. Skotið verður tí upp, at § 18, stk. 4 í alilógini verður stikað.

**Til § 14**
Sambært djóravælferðarlógini er bannað at skjóta kóp við høgli. Hesi viðurskifti verða frameftir løgskipað í kópalógini, og tískil verður skotið upp, at djóravælferðarlógin verður broytt samsvarandi.

Fiskimálaráðið, 4. mars 2019

**Høgni Hoydal (sign.)**
landsstýrismaður

/ Rógvi Reinert (sign.)

**Yvirlit yvir fylgiskjøl:**
Fylgiskjal 1: Viðmerkingar frá Vørn
Fylgiskjal 2: Viðmerkingar frá Uttanríkis- og vinnumálaráðnum
Fylgiskjal 3: Viðmerkingar frá Bóndafelagnum
Fylgiskjal 4: Viðmerkingar frá Havbúnaðarfelagnum
Fylgiskjal 5: Viðmerkingar frá Føroya landfúta
Fylgiskjal 6: Viðmerkingar frá Herbert Olsen